## Týsdagin 2. mai 2006 kl. 12.22



*Jenis av Rana løgtingsmaður*

Hvat tekst vanligi føringurin við gerandisdagar kl. 12.22 ? Jú rætt er, tá royna flestu at frætta, hvussu heimurin hevur tað - her hjá okkum og í fjarastu londum. So ætlar tú at fremja eitt kvett t. d, man hetta verða frægasta løtan at royna eydnuna.

Hetta visti løgtingsformaðurin, og samgongan, 2. mei 2006, tá seinna viðgerðin av uppskotinum um privatisering av Føroya Banka, og endaliga atkvøðugreiðslan, skuldi vera á Løgtingi. Vanligi steðgurin í tingfundinum, ið er millum gott og væl 12.00 og 13.30, var bráddliga strokin av skránni. Eingin tingmaður tyktist hava áhuga fyri heimsstøðuni hendan solljósa várdagin, ongin skonkti matarskránni í miðbýarins matarstøðum ein tanka, bráddliga tyktust allir proppmettir. Hví, jú stórmál var á skránni, ikki rundstykkja ella homoxexualitetsmálið, nei ogn allra føringa, tann vælrikni og steinríki Føroya Banki, skuldi privatiseras. Tá má døgverði verða døgverðitá má røðast, manuskriptini liggja jú og óltolnast á borðinum.

Ella var tað so? Sótu tingfólk í bíðirøð fyri at fáa orðið?

Var eg ikki árvakin, hevði neyvan nakar tikið orðið, og málið hevði verið avgreitt, áðrenn útvarpsmaðurin var náddur til Bush, Bin Ladin og Irak. Mær eydnaðist so dánt at náa knøttinum og biðja um orðið, áðrenn løgtingsformaðurin fekk kunngjørt: "nú atkvøða vit".

Meðan útvarpsmaðurin segði føringinum hvussu alheimsleikur fór fram, royndi eg eftir førimuni at tosa um, hvussu álvarsamt og stórt málið var. Neyvan ein føringur lurtaði, hugsaði eg, sum eg stóð og m.a. spurdi, um rætt var at selja gullhønuna, ið á hvørjum ári varp milliónir niður í landskassan. Og tóseinnapartin fekk eg eitt fax, í øðrum sambandi, har viðskiftafólkið takkaði mær so miriliga fyri tað, eg hevði sagt um " gullhønuna", sum nú skuldi avreiðast til tey, sum ikki megnaðu at reka og røkja hana, tá á stóð- fyrst í nítiárunum.

Men liðugur varð eg, og tá komu teir, teimum so vant, kropp á kroppi upp við viðmerkingum um álvarsmálið? Nei, ikki ein, her galt um at skunda sær, føringurin lurtaði jú eftir útvarpstíðindunum, meðan ogn hansara, Føroya Banki, varð avreiddur.

Stutt røddi Páll á Reynatúgvu, royndi sum frægast at vaska hendur tjóðveldismanna, áðrenn formaðurin langaði til og byrjaði atkvøðugreisluna. Sum í orðaskiftinum var eg aftur einsamallur, einsamallur mót teim 26, ið tá vóru í salinum- allir atkvøddu teir fyri.

Og tá føringurin aftaná tíðindini fór at fregnast hvussu mundi blíva við orðaskiftinum um næsta málið á skránni, privatiseringina av ogn hansara, Føroya Bankavar einki at hoyra. Málið varð avgreitt "í stillheit", meðan útvarpsmaðurin avleiddi.

Genialt, fantastiskt. Soleiðis gert tú, tá tú hevur varhugan av, at tað tú gert, betur er krógvað. Tú finnur ein blindan blett, og tá val er aftur, ja tá eru onnur snildi tøk.

Orðaskifti í tiltikna rundstykkjamálinum vardi í tætt við 2 tímar! Men sjálvandi, munur er á málum. Tað fyrra viðvíkti sølu av rundstykkjum v.m. sunnumorgnar. Ta seinna, málið um Føroya Banka, viðvíkti 6 milliardum hjá 48.000 føringum- tær skuldu avreiðast til nakrar fáar.

# Rehabiliteringsráðstevna í Norðurlandahúsinum




*Nógv fólk vóru møtt til ráðstevnuna í morgun*

**Í morgun byrjaði ráðstevnan "Eingin forðing" hjá MBF. Ráðstevnan, sum var um rehabilitering, varð hildin í Norðurlandahúsinum**

REHABILITERING
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Endamálið við ráðstevnuni er at vekja áhuga fyri rehabilitering hjá tí politiska og fakliga myndugleikanum. Í faldaranum, sum varð givin til luttakarnar á ráðstevnuni stendur: "Langt er eftir á mál, tá ið hugsað verður um rehabilitering av fólki við varandi breki, bæði tá um ræður vaksin og børn. Rehabiliteringshugtakið er stórt sæð eitt ókent fyribrigdi og verður mest sum ikki raðfest hjá politiska myndugleikanum". Ráðstevnan skal seta ljós á trupulleikarnar og vísa á møguligar loysnir. Fólk við fakligari vitan høvdu orðið, millum annað Gunnar Gamborg, ergoterapeutur, Marin Vang, sjúkrarøktastjóri og Lars Ødegaard, aðalstjóri í Norska Handikapfelagnum.

Leila Solmunde byrjaði við at bjóða vælkomin. Hon hugleiddi um tey 25 árini, sum MBF hevur á baki. Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum setti ráðstevnuna. Hann segði, at hann fór at hugsa um sangin hjá U2 "it`s a beutiful day", tá ið hann sá tað góða veðrið í morgun. Bono syngur, at tað er ein vakur dagur, og hann skal ikki fara aftur við.

- Soleiðis er eisini hjá okkum. Vit mugu stríðast fyri at náa tey mál, sum vit seta okkum. Leila Solmunde segði í skrivi frá MBF um støðuna hjá teimum við varandi sjúku ella breki: "onki um okkum uttan okkum". Tað er gleðiligt, at MBF vil taka ein virknan lut í tilgongdini at betra um umstøðurnar heldur enn at sita sum óvirkið offur, segði Hans Pauli Strøm.

- Eg havi størstu virðing fyri tí arbeiðið, sum MBF ger. Tey rørslutarnaðu standa sterkari í einum felag, serliga tá ið hugsað verður um eitt so fjølbroytt hugtak sum rehabilitering. Búmerkið hjá MBF er ein Dái, sum er skerdur, men kortini brosar hann sorgleysur. Dáin hevur rætt at vera til, hóast hann er skerdur. Hetta er tað, sum vit eiga at seta sum okkara mál, og eg fegnist um, at MBF sær møguleikar í staðin fyri trupulleikar, hóast at umstøðurnar hjá teimum við varandi sjúku ella breki ikki eru góðar, staðfesti Hans Pauli Strøm.

Næstur at hava orðið, var Gunnar Gamborg, formaður í dansku Ergoterapeutfelagnum.
Hann takkaði fyri at fáa møguleikan at sleppa til Føroya. Hann helt skemtandi fyri, at føroyingar eru eitt serligt fólkaslag, sum allatíðina borar hol í jørðina og síðani upp aftur. Her sipaði hann uttan iva til Norðoyatunnilin, sum hann eisini nýtti høvið til at ynskja føroyingum til lukku við. Eisini Gunnar nýtti U2 sum eitt játtandi dømi. Teir eru vorðnir rehabiliteraðir frá at liva í slumgøtunum í Dublin til at verða siteraðir av nógvum av heimsins leiðarum. Gunnar lýsti orðið rehabilitering sum eitt fjølbroytt orð. Tað skal skiljast alt eftir støðuni og tørvinum hjá brúkaranum. Orðið rehabilitering merkir endurreisn, at umskúla, at resosialisera, at koma aftur til fóta, at gerast nýtiligur, at vinna/endurvinna førleika.

-Tú kanst seta spurningin, um tú ert sjúkur ella frískur, ella um tú ert sunnur ella ósunnur? Ein ósunnur livimáti ger, at tað verður eitt sjúkt lív. Tú kanst fáa varandi mein av ósunnum vanum. Vit mugu fyribyrgja avleiðingarnar av tí ósunna lívinum. Hetta gera vit við at rehabilitera umstøðurnar og hugburðin. Endamálið er at koma á eina nýggja lívsleið, fáa eitt nýtt mál, segði Gunnar.

Gunnar kom inn á, at tað er týdningarmikið, at ein persónur, sum er í einari rehabiliteringstilgongd, ikki verður fataður sum ein sjúklingur, men sum ein borgari við somu rættindum sum tey við fullum førleika. Summi mugu liva við einum einari sjúku ella breki alt lívið, og tá má samfelagið veita hjálp til viðkomandi, so at hann kann fáa eitt gott og meiningsfult lív.



*Hans Pauli Strøm setti ráðstevnuna*